Løgmannabreyt, tann 20. novembur 2019

Góðu næmingar og foreldur

Nú nærkast jólini, og sum vant eru onkrar broytingar í tímatalvuni. Her er eitt yvirlit yvir skúlagongdina í desembur mánað og kunning um, nær jólahaldið verður.

Fríggjadagin 29. novembur	1.-4. tíma prýða vit skúlan. Allir næmingar skulu hava saks og límstift við í skúla. Vanlig undirvísing er eftir 4. tíma, tó gera nøkur klárt til tiltakið "Børn hjálpa børnum". Kl. 15-17 er tiltakið "Børn hjálpa børnum". Næmingar hava gjørt ymiskt at selja, lutaseðlasøla verður og til ber at keypa í kafe'ini . Skúlamyndirnar verða klárar at heinta.
2. – 16. desembur	Morgunsangur verður í námsfrøðiliga deplinum hvønn skúladag kl. 9.15.
2. -17. desembur	Vanlig undirvísing.
Týsdagin 17. desembur	Vit leggja síðstu hond á jólaframførsluna. Allir næmingar eru í skúla frá kl. 8.00-13.20.
Mikudagin 18. desembur	Allir flokkar møta kl. 8.00 í skúlanum. Vit venja til jólahaldið og hava frumframførslu. Øll fáa frí kl. 12.00, tó fer 1. flokkur í frítíðarskúla kl. 11.20. 2. og 3. flokkur er í skúla til kl. 13.20. Jólahald verður fyri næmingum, foreldrum og systkjum klokkan 16.00-18.00 Í desembur mánað fáa tit nærri kunning um jólahaldið.
Hósdagin 19. desembur	Skúladagurin er frá kl. 8.00-11.20 Vit dansa jólatræ.
Fríggjadagin 20. desembur	Øll møta kl. 8.00 í skúlanum. Vit fara til jólaguðstænastu í Hoyvíkar kirkju kl. 10.00. Eftir guðstænastuna hava vit jólafrí. 1.-3. flokkur fylgjast niðan í frítíðarskúlan. 7.-9. flokkur fer niðan í skúlan at fáa støðumetini.

Blíðastu jólaheilsanir
Skúlin við Løgmannabreyt